## Nýggjur iPod



Nýggjasta útgávan hjá Apple av iPod nevnist touch, og her eru fleiri funkur, enn á nøkrum øðrum iPod. Talan er um útgávu, sum hevur lænt hópin av hentleikum frá iPhone. Eitt nú wifi, touchscreen og browsara við Youtube-funku. Nýggi iPod kemur væntandi á marknaðin um fáar vikur, og verður kostnaðurin um 2.000 kr. Samstundis koma eisini nýggjar útgávur av iPod Nano og iPod Classic á marknaðin.

## MS-Tafiti

Microsoft hevur sent eina nýggja leitiskipan á marknaðin. Tafiti er heitið á nýggju skipanini, og er hendan grundað á royndirnar, sum teldurisin hevur gjørt sær við Microsoft Live Search. Talan er um leitiskipan, ið hevur fleiri nýggjar møguleikar, sammett við kappingarneytarnar. Fyri at nýta skipanina er neyðugt hjá brúkaranum at taka Silverlight-forritið av netinum fyrst. Hetta kann gerast á heimasíðuni hjá Microsoft.

# Privatir duga betri




*Tá Jonhard Mikkelsen og Annfinnur í Skála byrjaðu at gera orðabók vóru fleiri ivandi, um hetta var rætt. Orðabókaarbeiðið hoyrdi heima hjá tí almenna og í fróðskaparsetrinum, hildu fleiri. - Vit ánaðu ikki, hvat vit fóru í holt við. Men vit hildu bara, at um vit ikki gjørdu tað sjálvir, vórðu vit nokk noyddir at bíða heilt til dómadags, sigur Annfinnur í Skála.*

**Meðan orðabøkur drukna í embætisverki og grunnum, kemur privata felagið, Sprotin, 16. november í ár, út við Føroya higartil størstu og mest framsøknu orðabók. Mentamálaráðið skal stuðla orðabókagerð, men tað skal ikki spæla forlag, halda teir**

ORÐABØKUR

*Dorit Hansen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í november kemur ein nýggjur føroyskur orðabókapakki út. Forlagið Sprotin gevur út bæði eina enskt-føroyska orðabók á 1700 blaðsíður og eina føroyskt-enska orðabók á 2100 blaðsíður. Hartil kemur eisini ein fløga, sum kann dagførast regluliga á einum orðabókaportali, har nýggj ensk og føroysk orð alla tíðina verða førd inn. KT skipanin handan orðabókina er ment av føroyskari fyritøku.

Menninir aftan fyri hesa stóru verkætlan eru Jonhard Mikkelsen, lærari á Føroya Læraraskúla, og Annfinnur í Skála, lærari á Studentaskúlanum í Hoydølum.

Kári Davidsen, sum hevur gjørt eina týskt-føroyska orðabók, greiddi í samrøðu við Sosialin, týsdagin 4. september frá, hvussu hann í mong ár hevði søkt Mentamálaráðið um stuðul, men til fánýtis.

Jonhard Mikkelsen og Annfinnur í Skála hava fíggjað nógv av teirra arbeiðið sjálvir, men í 2001-03 fingu teir løn frá Mentamálaráðnum til at gera eina føroysk-enska orðabók umframt at gera telduførar dagføringar av hinum.

- Vit hava ikki ringar royndir av Mentamálaráðnum, men vit hava heldur ikki brúkt teir so nógv, siga teir báðir.

Tá teir byrjaðu at gera orðabók vóru fleiri ivandi, um hetta var rætt. Orðabókaarbeiðið hoyrdi heima hjá tí almenna og á Fróðskaparsetrinum, hildu fleiri.

Men í dag hava Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen prógvað, at tað letur seg gera.

### Landið stuðla og vinnan reka

Við drúgvu royndunum í orðabókavinnuni hava teir nakrar avgjørdar hugsanir um, hví so fáar orðabøkur koma út á føroyskum.

- Størsti trupulleikin á føroyska orðabókamarknaðinum í dag, er at onki skott er millum tað almenna, grunnar og forløg, sigur Jonhard Mikkelsen.

- Mentamálaráðið keypir rættindi til bøkur, sum so eisini gevur teimum rættindi til inntøkurnar, men ein slík forlagsuppgáva hoyrir ikki heima í einum mentamálaráði.

Síðani hava vit ein grunn, sum skal stuðla orðabókagerð, men tey keypa eisini orðabøkur upp. Alt er tí blandað saman, halda teir báðir í Sprotanum.

Orðbókagerð er ein partur